# Heystframsýningin 2006 latin upp

**Leygardagin lat heystframsýningin á Rundingi upp - í tí stóra grøna smiðjubygninginum á Skipasmiðjuni. Framsýningin heldur fram til tann 15. oktober.**

HEYSTFRAMSÝNING

*Orð & mynd*
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Heystframsýningin í smiðjubygninginum á Skipasmiðjuni lat upp leygardagin. Har er alskyns list at síggja í opnum hvítum hølum.

**Listafólkini eru:**
Andrias Andreassen, Hanni Bjartalíð, Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Bárður Jákupsson, Anker Mortensen, Olivur við Neyst, Marius Olsen, Torbjørn Olsen, Tróndur Patursson og Bjarni W. Sørensen.

**Í faldaranum fyri listaframsýningini stendur millum annað:**
- Listin hevur í mong ár verið ein formur hjá fólki at úttrykkja seg, uttan mun til tíðina og mentanina.
- Orðið ekspressionisma verður ofta nýtt. Ekspressionisman snúr seg um listarinnar førleika til at samskifta ígjøgnum kenslur.
- Heystframsýningin 2006 er meira merkt av mótsetningi enn av eind, hon er meira merkt av margfeldi enn av samanhangi, og tann einsháttur ella einvending sum orðið ekspressionisma leggur teir tólv framsýnararnar og føroyska list yvirhøvur undir, er óvirðilig. Heystframsýningin 2006 hevur fleiri orð uppiborið, hon hevur uppiborið, at vit víðka okkara orðatilfar, verða tilvitað um tey orð, vit velja, og ikki firnast margfeldi, stendur í faldaranum fyri heystframsýningini.
Inger Smærup Sørensen hevur skrivað fororðini í faldaranum.



*Nógv ymisk listaverk eru at síggja á heystframsýningini*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av eystri og um kvøldið regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og stundum regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin hvassur vindur ella skrið av suðri og landsynningi og stundum regn. Leygardagin minni vindur av landsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 29 |
| New York | 24 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 964 hPa. ex "HELENE" í ein útnyrðing av Azorunum fer spakuliga í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. við Skotland fer í útnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar stendur mestsum í stað. Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer móti Írlandi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/9 kl. $06^{00}$– 20/9. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,0°
Minsti hiti máldur í september: - 0,5° - Mesti hiti máldur í september: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/9 kl. $06^{00}$– 20/9 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í september: 0,0 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

22. september Tendring / Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. Sept | 09.13 | 21.31 | 08.13 | 20.31 | 08.28 | 20.46 | 11.13 | 23.31 | - | 12.13 | 07.28 | 19.46 | 06.28 | 18.46 | 09.28 | 21.46 | 10.28 | 22.46 | 08.58 | 21.16 | 10.13 | 22.31 |
| 26. Sept | 09.50 | 22.10 | 08.50 | 21.10 | 09.05 | 21.25 | 11.50 | - | 00.31 | 12.50 | 08.05 | 20.25 | 07.05 | 19.25 | 10.05 | 22.25 | 11.05 | 23.25 | 09.35 | 21.55 | 10.50 | 23.10 |
| 27. Sept | 10.31 | 22.53 | 09.31 | 21.53 | 09.46 | 22.08 | 00.10 | 12.31 | 01.10 | 13.31 | 08.46 | 21.08 | 07.46 | 20.08 | 10.46 | 23.08 | 11.46 | - | 10.16 | 22.38 | 11.31 | 23.53 |
| 28. Sept | 11.18 | 23.43 | 10.18 | 22.43 | 10.33 | 22.58 | 00.53 | 13.18 | 01.53 | 14.18 | 09.33 | 21.58 | 08.33 | 20.58 | 11.33 | 23.58 | 00.08 | 12.33 | 11.03 | 23.28 | - | 12.18 |
| 29. Sept | - | 12.08 | 11.08 | 23.33 | 11.23 | 23.48 | 01.43 | 14.08 | 02.43 | 15.08 | 10.23 | 22.48 | 09.23 | 21.48 | - | 12.23 | 00.58 | 13.23 | 11.53 | - | 00.43 | 13.08 |

5 707265 100029 >

Sosialurin